Muhammed-teknari:

# Hevði gjørt tað umaftur




*Fyri Claus Seidel var endamálið við Muhammed-tekningunum ongantíð ein roynd at provokera. -Tað var stutt sagt ein máti at vísa, at í Danmark er talu- og skrivifrælsi ikki til diskussión, sigur Claus Seidel, sum júst hevur vitjað í Føroyum*

**Hann var ein av teimum 12 teknarарnum aftanfyri tær víðagitnu Muhammed tekningarnar í Jyllands-Posten. Hóast deyðhóttaninar fuku um oyruni á Claus Seidel undir Muhammed kreppuni, ivast hann ikki. - Eg hevði gjørt tað umaftur, um tað skuldi verði, sigur Claus Seidel, sum í blaðnum í dag fyri fyrstu ferð traðkar fram og fortelur sína søgu**

PORTRETT
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Oktober 2005. Tvær vikur eru liðnar, síðani Jyllands Posten prentaði tær víðagitnu Muhammed tekningarnar hjá 12 blaðteknararum. Claus Seidel, ið var ein av teimum 12, er og keypir inn í Netto. Brádliga ringir fartelefonin hjá Claus.

– Ver verandi, har tú ert og far undir ongum umstøðum til hús einsamallur, sigur røddin í telefonini og heldur fram.

– Vit hava fingið frænir av eini drápshóttan móti tær. Ein av okkara bilum er á veg til tín, ljóða boðini, sum Claus nú skilur eru frá loyniliga, danska politinum, PET.

Løtu seinni situr Claus í politibilinum á veg til hús. Tá teir nærkast húsinum sær hann tveir aðrar politistar koma við konu síni. Tey hyggja uppá hvønn annan, og skilja brádliga álvaran í støðuni. Í fyrstu atløgu sleppa tey ikki inn, men mugu bíða, til politiið hevur tryggjað sær, at ongin bumba liggur fjald í húsinum.

Hjúnini fáa síðani nakrar fáar minuttir at taka tað allarneyðugasta við sær, áðrenn tey í skundi verða koyrd til eitt loyniligt stað av politinum.

## Ikki einhvør uppgáva

Tá Claus Seidel, síðst í september 2005, varð biðin at tekna profetin Muhammed til Jyllands-Posten, var hann fullgreiður yvir, at hetta ikki bara var ein uppgáva, sum einhvør onnur.

– Jú, eg visti, at tekningin kundi elva til meiri, enn bara at Pia Kjærsgaard bleiv fúkandi óð, smílist Claus Seidel.

– Men at hetta fór at gerast neistin, ið festi í eina altjóða kreppu, hevði eg aldrin grunað, leggur hann álvarsamur afturat.

Sum flestum kunnugt, byrjaði Muhammed kreppan við eini harmleysari barnabók um profetin Muhammed. Skjótt fræ ttist, at ongin teknari fekst at gera tekningar til bókina, tí teir óttaðust hevndaratgerðir frá muslimum. Sambært islam er tað nevniliga halgibrot at avmynda profetin. Fyri teknararnar vigaði óttin fyri reaktiónunum hjá muslimum sostatt tyngri enn frælsi til at tekna tað, teir høvdu hug til.

Eldfimi spurningurin um talu- og skrivifrælsi mótvegis islamisku trúnni gjørdist skjótt stóra kjakevnið í Danmark, millum annað í kjaksendingini Deadline á DR. Dagin eftir sendingina ringdi mentanar-redaktørurin á Jyllands-Posten, Flemming Rose, til Claus Seidel og bað um eina viðmerking til kjakið frá honum sum formanni í felagnum fyri danskar blaðteknarar.

– Eg segði, at høvdu tey biðið ein blaðteknara tekna til hasa bókina, hevði viðkomandi ivaleyst sagt ja. Vit eru jú vanir við at blanda okkum uppí og gera viðmerkingar til samfelagslig og politisk evni, greiðir Seidel frá.

## Játtaðu at tekna Muhammed

Svarið frá Seidel gav eftir øllum at døma Flemming Rose á Jyllands-Posten nakað at hugsa um. Nakrar dagar seinni ringdi Rose nevniliga aftur og spurdi, um Claus Seidel og helst nakrir aðrir frá Blaðteknarafelagnum vildu tekna Muhammed til eina grein í Jyllands-Posten um talu- og skrivifrælsi.

– Fyri meg var tað upplagt at siga ja og ein fínur møguleiki at markera, at eg ikki góðtaki sjálvsensur av nøkrum slag. Men eg vildi ikki svara fyri hinar teknararnar og bað Rose seta seg í samband við teir persónliga. Eg kravdi eisini, at minst 10 teknarar skuldu siga ja, fyri at okkara yrki skuldi vera umboðað á ein nøktandi hátt, sigur Seidel og leggur afturat, at hann sjálvsagt eisini kravdi, at teir sluppu at lesa greinina, so teir vistu, hvat teir so at siga skrivaðu undir uppá.

Tá avtornaði játtaðu 12 teknarar at vera við. Fyri teir flestu var tað ein løtt avgerð at taka, meðan onkur ivaðist. Serliga var tað atlitið til familju og børn, ið fekk onkran at aftra seg.

– Vit brúktu nógva tíð uppá at kjakast aftur og fram, tí fyri meg hevði tað alstóran týdning, at teknararnir eisini framyvir vildu standa við teirra avgerð. Teir skuldu vera greiðir yvir, at í tí løtuni, greinin varð prentað, var eingin vegur aftur, sigur Claus Seidel.

## Undir jørð

Og Seidel kom at sanna síni orð. Fáar dagar eftir at greinin var prentað, komu fyrstu bumbuhóttaninar móti Jyllands-Posten. Síðani fylgdu ein røð av mótmælis-